Var tað roykurin, ella kanska - tann fyrri sigur yvir deyðanum -, er tað eingin ið veit, men í øllum førum bleiv Pablo Picasso ein slóðbrótandi listamaður. Ótrúliga arbeiðsamur líka til hann andaðist 91 ár seinni.

Picasso málaði seg inn í listaheimin, sum ein av teimum størstu, og gav heiminum ein nýggjan hátt at fata listina uppá.

Seks ára gamal teknaði Pablo so livandi tekningar, at tað ræddi bæði hann sjálvan og faðir hansara við, sum var teknilærari.

Tá Picasso var um 20 ára aldur, byrjaði hann at royna nýggjar hættir við tekningum og málningum sínum. Í staðin fyri at mála eitt myndevni, sum tað sær út frá einum staði, teknaði hann tað frá øðrum sjónarhornum, sum ikki síggjast í veruleikanum. Hann málaði nýggj geometrisk skap og endurgav sína egnu uppfatan av tí vit kalla fyri veruleika. Picasso var undangongumaður hjá listafólkum, sum skaptu tað abstraktu listina.

Tað var áhugavert at ganga og hyggja, hvussu Picasso menti seg gjøgnum árini frá 1893. Vit kundu fylgja honum frameftir, við fittum tekningum frá tí hann var 12 ára gamal, - av hønum, hestum, hermonnum o.s.v.

Ráðini vóru ikki so góð, so hann málaði á træsprek, smáar detaljur, har ein sær, at hann roynir at mála ymisk evnir, sum t.d. vindeygapartí, smáar landslags- og andlitsmyndir. Hetta vísir okkum, hvussu hann hevur roynt at læra seg handverkið frá grundini av, og ikki er gingin lættliga um smálutirnar, sum jú er umráðandi at duga anatomiina og at vita hvussu beinagrindin er uppbygd fyri seinni at kunna mála einfaldari ella abstrahera.

Ein hugtakandi málningur var av eini konu, sum liggur til tað síðsta og læknin situr hjá henni og tekur pulsin. Við seingina stendur eisini ein kona, sum heldur eini gentu, sum uttan iva er dóttir hesa doyggjandi. Málningurin mundi vera einar 2x3m til støddar. Picasso dugdi eisini at mála veruligar málningar, sum onkur vildi sagt.

Í árinum 1900 gjørdi Picasso sína fyrstu ferð til Paris. Hetta hevði eina ómetaliga stóra ávirkan á hann og menti hann nógv, tá hann sá verk eftir Manet, Vollard, Cézanne, Toulouse-Lautrec, Bonnard og Vincent Van Gogh. Onkrar persónsmyndir mintu meg ikki sørt um Van Gogh.

Sama kvøld var eg til eina konsert í eini kirkju við einum guitaristi í heimsklassa, sum æt Marel Gonzales. Hevði glett meg soleiðis allan dagin at sleppa at hoyra henda guitarsnilling. Kirkjan var nærum fullsett, tá Gonzales trein inn á pallin og byrjaði at spæla. Eg lurtaði, men hvat varð eg skuffaður. Væntaði mær at hoyra eitt vælklingandi ljóð. Men ljóðið frá guitarinum hoyrdist so illa, at eg rýmdi óður út úr kirkjuni eftir at 3. sangur var spældur. Fyri mær hevði tað verið líka gott at hoyrt hann í einum lítlum transistorradio heima við hús. So eg gekk mær ein túr inn í tann gamla Gotiska býarpartin fyri at koma niður aftur á jørðina. Gekk gjøgnum smalar hugnaligar steingøtur.



*Pablo Picasso búði í Barcelona frá tí hann var 14 ára gamal til hann var 23 ár. Har fekk hann eisini sína listarligu utbúgving*



*Tað var áhugavert at ganga og hyggja, hvussu Picasso menti seg gjøgnum árini frá 1893. Vit kundu fylgja honum frameftir, við fittum tekningum frá tí hann var 12 ára gamal, - av hønum, hestum, hermonnum o.s.v*

Nú hoyri eg operasong. Gekk eftir ljóðinum. Komi til eitt vælklingandi stað, har nógv fólk stóðu og lýddu á, meðan ein sjarmerandi operasangari, minti ikki sørt um útsjóndina á Pæturi tí Stóra, - langhærdur við moskitera skeggi. Hann sang í besta Careras stíli. At hoyra hendan mannin syngja, var so hjartanemandi og vakurt, at eg mátti, aftaná framførsluna, løna honum fyri tað og takka honum persónliga fyri eina ógloymandi løtu. Hann bjargaði tí annars minni eydnaða kvøldinum.

17. apríl, ein mánadag, fór eg at vitja søgusavnið í gamla býarpartinum, sum gjøgnum 500 ár hevur verið sæti hjá teimum katalanska kongunum. Her hevur Columbus staðið einaferð á kongaplássinum við sínum stóru ætlanum. Upprunaliga var umráðið umgyrt av einum rómverkum býarmúri, men teir núverandi bygningarnir eru frá 13 – 14 talinum. Tað var áhugavert at síggja ymisk amboð og ymisk brúksting hjá iberarum, hvussu væl krukkur og íløt vóru prýdd við djórum og menniskjum, málað við svørtum og reyðum. Nágreinligar útgravingar vóru gjørdar her á staðnum, so her fóru vit við eini lyftu niðureftur og aftur í tíðina, heilt aftur til áðrenn Kristi føðing. Her kundi ein ganga á teimun gomlu rómverku gøtunum og hyggja inn í hús teirra og goymslur til t.d. fisk og vín. Ein løgin kensla.

Rómverjar og Maurarar (arabarar) eru teir, sum mest hava baldrast í Spaniu, men aðrir herskarar hava eisini rátt fyri borgum í styttri tíðarskeiðum. Orsøkin til, at tann Iberiska hálvoyggin hevur verið fyri so nógvum ágangi er, at hon liggur so væl fyri. Hon hevur Miðalhavið fyri eystan, Atlantshavið fyri vestan, Afriku fyri sunnan og Evropu fyri norðan.

Vitjaði eisini tað katalansku dómkirkjuni, sum var ein sera, sera stórsligin kirkja. Setti meg á ein bonk fyri at hyggja uppí hettar velduga loft og undrast, meðan orgultónleikur hoyrdist. Hon er ein tann flottasta gotiska kirkjan í Spaniu.

Hitti ein teldufrøðing úr Milano, sum var komin higar at slappa av. Vit komu í prát. Hann vísti mær eina internetcafé, har eg kundi tosa heim og fáa teldupost. Teldan hevur verið mær ein góður vinur í einseminum. Havi fingið skrivað meira enn nakrantíð. Tað at kunna tosa heim, hevur eisini givið mær megi av nýggjum.

Hevur Barcelona nógv at bjóða av myndlist, so hevur hann sanniliga eisini nógv at sýna fram av byggilist. Hvagar tú vendir tær, so sært tú ein bý á tremur við flottum bygningum. Bygningsverk sum vekur størst ans her í Barcelona, eru bygningarnir eftir tann víðagitna modernistin Antoni Gaudi. Hann var Barcelonari. Var borin í heim 1852. Hann var eitt geni uttan sín líka og ein slóðbrótandi listamaður.

Týsdagin 18. apríl fór eg við Metrobananum, sum er í teimum flestu størru býunum í Spaniu. Tú keypir ferðaseðil í automatum, men ikki var tað lætt hjá mær at lesa hvat ið á har stóð, so eg trýsti bara á teir knøttar, sum vóru mest slitnir. Og rætt var, eg kom beint til staðið, har kirkjan var, sum Gaudi teknaði. Hon líkist einum ævintýrslotti, við litføgrum tornum og fantasi blómum. Hendan kirkjan eitur La Sagrada Familia (tann heilaga familian). Hetta var Gaudi`sa mest ambitisiøsa verk. Tað er ei undur í, hví hendan ólidna kirkja er blivin størsta turist attraktión í Barselona.

Tær tríggjar fasadurnar í kirkjuni ímynda Jesu føðing, Jesu líðing og Jesu uppreisn. Gaudi náddi bert at gera tað vøkru eystursíðina lidna, Facana Del Naixement (Føðing Jesusar).

Við trappum ella lyftu er tað møguligt at koma upp í eitt av teimum klønu tornunum og í 60 m hædd njóta eitt stórsligi útsýni yvir henda millíónbý. Síðstu



*Nógva staðni runt um í Barcelona eru nógv dømi um hansara litfagra og fantasiríka stíl. Í 1926 var Gaudi yvirkoyrdur av einum sporvogni og doyði*